gult12 cyan12 magenta12 svart12

ítróttur

Nr. 109 • týsdagur • 12. juni 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo

# B36 gjørdi skjótt av

**B68 megnaði ongantíð at hótta, eftir at B36 miðskeiðis í 1. hálvleiki hevði fingið tvey mál**



Jens Kristian Hansen, Pól Thorsteinsson, Herbert í Lon Jacobsen og Tróndur Vatnhamar hava verið fastir menn hjá B36. Sunnudagin var eingin teirra við á Toftum, men tað tóktist ikki nerva havnarliðið. B36 skoraði tvey mál miðskeiðis í 1. hálvleiki, og tað var nóg mikið at vinna sannaførandi sigur.

Fyrra málið áttu heimamenninir við rubb og stubb. Jan C. Dam hevði møguleika at sparka burtur, men tá málverjin kom út ímóti, drálaði veteranurin, bólturin fór inn um teir báðar, og sovorna gávu sigur John Petersen ikki nei til.

Seinna málið var flott einmansavrik hjá John Petersen. Eftir innkast heilt frammarlaga í vinstru, dró landsliðsmaðurin til brotsteigarsamankomingina, áðrenn hann brádliga smekkaði til, og bólturin streyk dygst inn við nærru stólparótini. Einki undarligt var, um málverjin í hesum førinum roknaði við innleggi. Men tað var merkisvert, at John Petersen ótarnaður skuldi megna at draga seg burturúr tronga við trimum reyðum, áðrenn hann smekkaði til.

Plássið at gera burturúr er heilt nógv avmarkað hesa ferð, verður sagt av blaðnum.

Men eingin ivi skal vera um, at B36 hevði fullkomuliga tak á, eftir at teir vóru komnir framum. Fyrstu løtuna eftir málini (inntil Magni á Lakjuni fór skaddur av vøllinum) lógu fleiri mál í luftini. Í 3–4–1–2 uppstilling, har Jákup á Borg var væl upplagdur hangandi álopsmaður, gekk væl at spæla seg ígjøgnum – serliga í vinstra borði.

Toftamenn vóru væl við fyrstu løtuna, og tað kann altíð gitast um, hvussu tað hevði hilnast, um royndin hjá Fróða Benjaminsen eftir horna úr vinstru, ikki hevði verið bjargað á strikuni. Tá var støðan 0–0. Men eftir tey bæði B36 málini megnaði B68 ikki at hótta. Teir høvdu onga tyngd í borðunum, og miðvallarspælið hevði ongantíð við sær, at álopsmenninir gjørdust leysir av B36 miðverjuni.

Sum seinna umfarið leið, royndi B68 at spenna bogan alt meiri, og í einum settu teir tríggjar frískar menn á vøllin. Men tað var serliga B36, sum fekk møguleikarnar, uttan at teir bóru mál við sær. Tað mundu teir kortini ikki hugsa so nógv um, tá síðsta bríkslið hevði verið. Tí tey trý stigini taldu nógv – ikki minst seinni á degnum, tá HB bara hevði megnað 0–0 ímóti B71. Onkur B36ari helt fyri, at teir høvdu vunnið fimm stig sunnudagin!

B68: Magnus Poulsen – Marlon Jorge, Jan C. Dam, Hans Fróði Hansen, Jákup Eli Olsen – Arnold Joensen, Fróði Benjaminsen, Øssur Hansen, John Heri Dam – Marcello Marcellino, Súni Fríði Johannesen

B36: René Torgarð – Fróði Clementsen, Egil Zachariassen, Arnbjørn Danielsen – Kenneth Jacobsen, Klæmint Matras, Jan Guttesen, Jákup á Borg, Heðin á Lakjuni – John Petersen, Magni á Lakjuni

VB – NSÍ 5-0 (2-0)

# Vágbingar reistust

**Eftir trý tap á rað, fingu føroyameistararnir endiliga ein sigur til høldar. Óstøðuga NSÍ-liðið varð sent norðuraftur við einum 5-0 tapi**

FÓTBÓLTUR
*Stefan í Skorini*

Føroyameistararnir úr Vági hava verið í einum rættiligum aldudali seinastu tíðina. Eftir tveir sigrar í teimum fyrstu dystunum hevur VB tapt tríggjar á rað. Tapini hava øll verið 2-1, so tí bendir okkurt á, at teir ikki hava havt tað neyðuga hepni við sær.

Endiliga megnaðu teir at venda gongdini við einum greiðum og uppibornum sigri á runavíkingum, sum enn einaferð vísa seg at avhenda ógvuliga óstøðug avrik.

### Venjarin legði fyri

Tað var leikandi venjarin hjá VB, Krzysztof Popczynski, ið skeyt tvey tey fyrstu málini og legði tí lunnar undir ein ruddiligan sigur hjá VB.

Fyrsta málið skeyt kom eftir innlegg frá Robert Cieslewicz. Robert rekur framvið einum leikara í vinstru síðu og leggur so inn til landsmannin úr Póllandi, Krzysztof, ið er staddur við nærmastu stong. Hann setir fótin á og leggur VB framum.

Næsta málið var meinlíkt tí fyrsta. Hesuferð er tað tó Birgir Jørgensen, sum leggur innfyri úr høgru til nærmastu stong, har Popczynski er staddur skorar enn einaferð til hálvleiksstøðuna 2-0.

VB hevur gravað tann roynda málslúkin Birgir Jørgensen framaftur, og hann skeyt tvey av málunum.

Jón Pauli Olsen var upphavsmaður at báðum málunum hjá Birgiri. Jón Pauli var staddur í vinstra borði, haðani hann legði innfyri til Birgir, sum er ógvuliga sterkur í luftspælinum, og hann høvdaði bóltin í netið úr fimm metra fjarstøðu.

Fjórða málið stóðst eisini av samanspæli millum Birgir og Jón Paula, sum aftur hesuferð legði innfyri til Birgir, ið høvdið uppum málverjan.

Seinasta málið skeyt Marner Richard úr tveimum metrum, tá Robert Cieslewicz legði innfyri.

### Einki ivamál

Vágbingar høvdu sett í seg, at teir skuldu vinna henda dystin, og tað sást beinanvegin, at teir vóru ágrýtnari enn gestirnir. Nøkur langskot var einasta hóttanin Bjarni Johansen skuldi taka sær av í VB málinum.

Vágbingar vóru áleypandi allastaðni á vøllinum, og hetta fingu teir eisini løn fyri. VB er nú við aftur í stríðnum um heiðursmerkini og liggur á triðja plássi við níggju stigum saman við HB og KÍ.

Kærkomni sigurin gevur teimum eisini trúnna um, at liðið kann vera við í stríðnum um heiðursmerkini. NSÍ hinvegin hevur aftur víst seg at vera eitt óstøðugt lið, sum kann spæla góðan fótbólt tann eina dystin og út av lagi vánaligan tann næsta.

Um avrikini eru meira støðug, kann liðið gera meira um seg í landskappingini.

**VB – NSÍ 5-0 (2-0)**

1-0: Krzysztof Popczynski
2-0: Krzysztof Popczynski
3-0: Birgir Jørgensen
4-0: Birgir Jørgensen
5-0: Marner Richard

GÍ – FS Vágar 8-2 (5-2)

# GÍ strýkur avstað

**Oddaliðið GÍ hevur nú vunnið seks dystir á rað og stevnir frá hinum liðunum. Sigurin á FS Vágum var lættur, og vágamenn hava nú latið 23 mál inn í tveimum dystum**

FÓTBÓLTUR
*Stefan í Skorini*

Einki ivamál var nakrantíð um, at gøtumenn fóru at vinna dystin mói FS Vágum. Sigurin var ruddiligur, og støðan var 8-2, tá dómarin bríkslaði fyri seinastu ferð.

GÍ stevnir beinleiðis móti tindunum í føroyskum fótbólti. Sunnudagin vunnu teir sín sætta sigur á rað, og alt bendir á, at gøtumenn vera tungir at syfta í ár.

FS Vágar er hinvegin í sera tungari aldu fyri tíðina. Seinasta vikuskifti tapti felagsliðið úr Vágunum heili 15-0 fyri B36, og hesuferð var tapið 8-2. 23 mál farin inn í tveimum dystum, og tað er alt ov mikið.

Tapið seinasta vikuskifti fekk avleiðingar, tá venjarin Kestutis Latoza varð sagdur úr starvi, og nú taka tveir aðrir venjarar sær av liðnum. Eingin eyðsæð vend er tó at hóma har vesturi.

### Málslúkurin Helgi

Helgi L. Petersen hevur í ár sligið navn sítt fast sum ein framúr góður framherji við máltevi sum fáur. Hetta vísti hann enn einaferð sunnudagin, tá hann hevði seinasta fótin á trimum av málunum hjá GÍ, og hann hevur nú skotið 11 mál í landskappingini.

Tað var eisini Helgi, sum legði fyri, tá einir fimm minuttir vórðu spældir. Síðani skeyt pólverjin Zdzislaw Janik sítt fyrsta mál í føroysku landskappingini. Miðvallarin Sámal økti til 3-0 við høvdinum, áðrenn Hannus Olsen minkaðu um munin við brotssparki.

Sámal Joensen skeyt síðani tvey brotsspørks, sum bæði endaðu í málinum, áðrenn Tór Ingar Akselsen minkaði um munin til 5-2 við einum høvdara.

Eftir steðgin komu bara trý mál. Helgi L. Petersen átti tvey teirra, meðan Sámal Joensen setti sítt triðja brotsspark í kassan, og miðvallarin fekk fýra mál sunnudagin.

### Væl koyrandi

Undir leiðslu av Jóhan Nielsen hava gøtumenn tikið tey flestu á bóli í hesum kappingarárinum. Hóast liðið mátti lúta í steypakappingini, hava teir havt eina flúgvandi byrjan uppá kappingina.

Atjan stig eftir seks dystir. Tá skal eisini havast í huga, at GÍ longu hevur spælt á útivølli móti HB, VB og KÍ, meðan teir hava vunnið á B36 í Sarpigerði.

Hesir eru nakrir av teimum torførastu dystunum í landskappingini, og úrtøkan hevur verið 100%.

**GÍ – FS Vágar 8-2 (5-2)**

1-0: Helgi L. Petersen
2-0: Zdzislaw Janik
3-0: Sámal Joensen
3-1: Hannus Olsen (br.)
4-1: Sámal Joensen (br.)
5-1: Sámal Joensen (br.)
5-2: Tór-Ingar Akselsen
6-2: Helgi L. Petersen
7-2: Helgi L. Petersen
8-2: Sámal Joensen (br.)

gult13 cyan13 magenta13 svart13



HB – B71 0-0 (0-0)

# Havnarmenn mistu stig

**HB megnaði ikki at basa einum hart arbeiðandi B71 liði, sum fekk eitt dýrabart stig á botninum av stigatalvuni. HB liðið var ógvuliga tannleyst og megnaði sjáldan at skapa vandamiklar støður frammanfyri B71 málinum**

FÓTBÓLTUR
*Stefan í Skorini*

Tað vóru nakrir tamir havnarmenn, sum fóru á vøllin í Gundadali sunnudagin, meðan leikararnir av Sandoynni góvu HB óvæntaða harða mótstøðu. Tískil eydnaðist tað ikki HB at vinna á sandoyingum.

Tað er eingin loyna, at hetta er ein dyggur smeitur fyri HB, sum hevur ætlanir um at liggja í oddinum í ár eins og í fjør. At spæla javnt móti B71 á heimavølli kann lýsast sum tvey mist stig heldur enn eitt vunnið stig.

Tað sást týðuliga, at HB liðið ikki kláraði seg fyriuttan fýra av sínum lyklaspælarum. Allan Mørkøre, Jóhannis Joensen, Andrew av Fløtum og Hans á Lag vóru ikki at síggja á HB liðnum í dag, og hetta merkti avrikið hjá havnarliðnum. Hinir lyklaspælararnir sum Uni Arge, Rúni Nolsøe, Jón Rói Jacobsen og Rógvi Jacobsen høvdu tískil eina størri byrðu á sínum herðum, men teir megnaðu ikki at spíla seg nóg mikið út, so teir fingu lyft liðið upp á hægri støði.

Hinvegin skal einki takast frá sandoyingum, sum vóru grammir í nærdystum og veruliga stríddust fyri at ogna sær í minsta lagi eitt stig. Tað eydnaðist, og vóru teir hepnari endaði okkurt av skjótálopunum við máli.

### Fáir málmøguleikar

Langt var ímillum veruligar málmøguleikar í Gundadali, og tí var dysturin ikki serliga undirhaldandi fyri áskoðaran. HB hevði teir vandamiklastu, tá teir fyri steðgin spældu seg fram til vandamiklar støður. Uni Arge kom einaferð í eina góða støðu, men Valdemar bjargaði, og Rúni Nolsøe hevði ein fluktara, sum endaði omanfyri málið.

HB álopið var ógvuliga tannleyst, og teir megnaðu sjáldan at spæla seg fram til stórar málmøguleikar. Jógvan Jón Petersen og Bernhard Petersen í miðverjuni hjá B71 stóðu stinnir allan dystin, og teir megnaðu at halda Una Arge í stuttum tjóðri, so hann ikki slapp framat fatinum.

Valdemar Nowicki skal eisini hava rós fyri at vera sera tryggur í luftspælinum. Antin hevði hann bóltin í føvninginum, ella syrgdi hann fyri at sláa hann langt út úr brotsteiginum.

Dysturin var sera illa spældur, mistøkini vóru ógvuliga mong. Eitt ótal av sendingum funnu ikki vegin fram til ta ætlaðu adressuna, og tað hevði við sær, at bólturin mangan ferðaðist millum liðini, uttan at nakað uppbyggjandi spæl varð sett í gongd. Hetta er ikki HB líkt, og vánaliga avrikið hjá teimum varð eisini revsað av B71.

B71 spældi við eini 4-5-1 skipan við Kára Nielsen sum álopskendum miðvallara, meðan Eli Hentze var einsamallur framherji. Liðformaðurin hjá B71 fekk ikki nógv burturúr har frammi, men seint í dystinum var hann fluttur aftur á miðvøllin, tá tørvur var á royndum kreftum á miðvøllinum.

Í seinna hálvleiki tveitti HB nógv fólk frameftir, og tí gjørdist tað heldur tunnligt í verjuni. Hetta gav B71 møguleika at gera skjótálop niðan móti HB málinum. Nakrar ferðir gjørdist tað vandamikið, men Bárður Johannesen í HB málinum hevði ongar trupulleikar við at taka royndirnar frá sandoyingum.

Av beinkinum royndi Ion Geolgau av øllum alvi at dirigera sínar menn fram til sigurs, tó uttan at hetta hepnaðist. Móti endanum flutti hann Jón Róa Jacobsen úr verjuni fram í álopið í eini seinastu roynd at fáa vinnandi málið, men hetta eydnaðist ikki. Kanska skuldi hann gjørt hetta nakað fyrr í dystinum, tí einki vildi bera til har frammi.

Tá dysturin varð bríkslaður av, fóru armarnir hjá B71-arunum upp í loft, meðan heimaliðið fór av vøllinum við niðurboygdum høvdi. Tað sást eisini, at sandoyingar vóru útlúgvaðir, tí fleiri høvdu krampa.

## Støðan, 1. deild menn

| | | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | GÍ | 6 | 6 | - | 0 | - | 0 | 22 | 7 | 15 | 18 |
| 2 | B36 | 6 | 4 | - | 1 | - | 1 | 24 | 4 | 20 | 13 |
| 3 | HB | 6 | 3 | - | 1 | - | 2 | 10 | 7 | 3 | 10 |
| 4 | VB | 6 | 3 | - | 0 | - | 3 | 18 | 7 | 11 | 9 |
| 5 | KÍ | 6 | 3 | - | 0 | - | 3 | 7 | 11 | -4 | 9 |
| 6 | NSÍ | 6 | 2 | - | 2 | - | 2 | 6 | 10 | -4 | 8 |
| 7 | B68 | 6 | 2 | - | 1 | - | 3 | 9 | 13 | -4 | 7 |
| 8 | EB/Streymur | 6 | 2 | - | 0 | - | 4 | 8 | 10 | -2 | 6 |
| 9 | B71 | 6 | 1 | - | 1 | - | 4 | 5 | 11 | -6 | 4 |
| 10 | FS Vágar | 6 | 1 | - | 0 | - | 5 | 5 | 34 | -29 | 3 |

## Máltindurin

| | | |
|---|---|---|
| Helgi L. Petersen | GÍ | 11 |
| John Petersen | B36 | 7 |
| Sámal Joensen | GÍ | 6 |
| Heðin á Lakjuni | B36 | 5 |
| Krzystof Popczynski | VB | 5 |
| Jákup á Borg | B36 | 4 |
| Magni á Lakjuni | B36 | 4 |
| Sorin Anghel | EB/Streymur | 4 |
| Súni Fríði Johannesen | B68 | 3 |
| Jón Sigurð Gleðisheygg | EB/Streymur | 3 |
| Uni Arge | HB | 3 |
| Aleksander Djordjevic | KÍ | 3 |
| Birgir Jørgensen | VB | 3 |
| Marek Vierzbicki | VB | 3 |

KÍ – EB/Streymur 0-4 (0-2)

# EB/Streymur loypti hvøkk á

**EB/Streymur hevur nú av álvara víst øllum, at liðið hevur nakað at bjóða, og at uppflytararnir kunnu vera vandamiklir. Hetta kunnu klaksvíkingar sanna, nú KÍ tapti 4-0 á Norðoyastevnu**

FÓTBÓLTUR
*Stefan í Skorini*

Júst sum tey flestu hildu, at Tomislav Sivic hevði fingið gongd á hjá KÍ verða teir sendir av vøllinum á Djúpumýri við einum eyðmýkjandi stórtapi móti uppflytarunum úr Sundalagnum.

4-0 gjørdist endaliga úrslitið, og mong fingu ein lítlan hvøkk, tá tey hoyrdu, at EB/Streymur hevði fingið sín næsta sigur til høldar í hesum kappingarárinum. Felagsliðið hevur fleiri ferðir í ár víst, at teir hava nakað í umbúna, men ein so greiður sigur á KÍ var ikki væntandi.

EB/Streymur hevði eitt verjukent útgangsstøði við nógvum fólki aftanfyri bóltin á egnari hálvu. KÍ spældi hinvegin álopsfótbólt burturav og sendi nógv fólk frameftir. Hetta vórðu teir tó revsaðir fyri.

### Góður kontrafótbóltur

EB/Streymur hevði eina greiða ætlan fyri dystin, og klóka leikætlanin hjá Bergi Magnussen var fremsta orsøkin til sigurin. Fyri tað fyrsta skuldi málið verjast væl, men so skjótt bólturin varð vunnin, settu teir vandamikil skjótálop í gongd, og teir herjaðu á KÍ málið við fleiri monnum. Nógv fólk fór við niðan á KÍ hálvuna, tá EB/Streymur søkti at málinum.

Henda ætlanin eydnaðist avbera væl.

Longu í fyrra hálvleiki førdi EB/Streymur við tveimum málum. Útiliðið legði fyri, tá Andrias Dahl sendi innum verjuna til Eyðfinn Joensen, sum kom stormandi móti málinum. Hann sendi bóltin í netið til 1-0.

Garvaði maðurin í álopinum hjá EB/Streymi, Jón Sigurð Gleðisheygg, skeyt tvey av málunum sunnudagin. Fyrra málið skeyt hann fyri steðgin, tá Sorin Anghel spældi hann frían. Í fyrstu atløgu hevði KÍ verjan fótin fyri, men bólturin sprakk aftur til Jón Sigurð, sum sendi í netið til hálvleikstøðuna 2-0.

KÍ gjørdi fleiri broytingar í hálveikinum. Allan Joensen og Aleksander Djordjevic, sum báðir vóru hálvskaddir komu á vøllin. KÍ spældi nú við tveimum framherjum og tveimum álopskendum miðvallarum.

Tað eydnaðist tó ikki at koma innaftur í dystin. Hinvegin var tað útiliðið, sum fekk enn fleiri mál.

Jón Sigurð Gleðisheygg økti til 3-0. Sorin Anghel royndi seg við skoti, men málverjin hálvbjargaði, og Jón Sigurð fylgdi upp og setti í netið.

Seinasta málið skeyt rumenin Sorin Anghel. Eyðfinn Joensen spældi Sorin til vinstru í brotsteiginum, og hann langði til. Skotið rakti báðar stengurnar, áðrenn tað endaði í netinum.

Tá KÍ hevði framt allar sínar útskiftingar, noyddist Allan Joensen av vøllinum aftur vegna vøddaskaða í lærinum. Hetta hevði við sær, at KÍ spældi við tíggju monnum seinasta hálva tíman.

Tað var nú heldur EB/Streymur, sum kundi skotið fleiri mál, heldur enn at KÍ kundi minka um munin.

Gunnar á Steig, sum fyrr hevur vart málið hjá KÍ, men sum nú spælir við EB/Streymi, spældi ein sera góðan dyst. Hann hevði óivað okkurt at vísa sínum kenningum í Klaksvík.

EB/Streymur hevur nógv gott frá hesum dystinum. Hetta er tann fyrsti dysturin, har verjan hevur megnað at hildið málið reint, og liðið hevur ikki skotið so nógv mál í einum dysti í 1. deild fyrr. Spennandi verður at síggja, hvussu teir fara at standa seg móti HB komandi vikuskifti.

Lat tað vera sagt fyri seinastu ferð. EB/Streymur er als ikki fremsti kandidaturin at flyta niður úr bestu deildini.

KÍ – EB/Streymur 0–4 (0-2)
0-1: Eyðfinn Joensen
0-2: Jón Sigurð Gleðisheygg
0-3: Jón Sigurð Gleðisheygg
0-4: Sorin Anghel